SOSIALURIN

FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG

NR. 38.

LEYGARDAGIN 20. SEPTEMBER 1958

31. ÁRG.

Eingin skilamaður

ivast nú í at einasta uppskotið í sjómarksmálinum, sum dugdi, var uppskot Javnaðarflokksins á tingi

Høvdu sambandsmenn, fólkaflokksmenn við gamla sjálvstýrismonnum og tjóðveldismenn greitt atkvøðu fyri hesum uppskoti, ið segði, at bretar, áðrenn nakar sáttmáli varð gjørdur, skuldu binda seg til at góðtaka tað sjómark við Føroyar, sum teir við sáttmála ella við tolereran komu at góðtaka ella finna seg í við Ísland, so høvdu vit í dag ONGAR TRUPULLEIKAR havt í SJÓMARKSMÁLINUM

Vit hava størri og sterkari sjómarksrætt enn íslendingar, tí vit fingu ígjøgnum danska kongin longu á døgum skotska kongsins Jákups hin fyrsta Skotland at viðurkenna, at føroysku fiskimenninir áttu veiðirættin á fiskigrunnunum kring Føroyar.

Tað var tí ikki at ivast í, at bretar uttan minsta himpr vildu skriva undir hesa treyt, áðrenn sáttmálin varð gjørdur.

Men *sambandsmenn, fólkaflokksmenn* og *tjóðveldismenn* feldu javnaðarmannauppskotið. Síðan samtyktu sambandsmenninir og fólkaflokksmenninir 12 árasáttmálan um trímílamarkið, meðan tjóðveldismenn hildu við støðu sína um uppsøgn og loysing frá Danmark.

Hvussu rúkandi skeivt tað var at binda seg til henda vanlukkusáttmála, nýtist okkum ikki at siga mong orðini um. Tað er nú hvørjum einasta menniskja í Føroyum greitt.

Men tað er eisini stórur munur á, hvør støðan er betri, javnaðarmanna ella tjóðveldisins.

Vann javnaðarmanna støðan, var gátan loyst.

Vit komu so at vinna tað, ið Ísland verður at vinna, annaðhvørt Bretland gevur eftir frívilliga ella tað má slaka ella heilt tapa við dóm stólin í Haag ella við einari meirluta avgerð av teimum sameindu tjóðunum — talan er um báðar hesar møguleikarnar. Vit koma at vinna uttan illsemju, stríð og bardaga.

Men tjóðveldisstøðan vildi borið við sær, at vit fingu somu trupulleikar, stríð og bardaga sum íslendingar.

Og hvussu vildu vit verið førir til tess?

Harnæst vildi loysingin hjá tjóðveldinum, sum tað hevur sum høvuðsagitatiónarnummar fyri at vinna 12 mílamarkið, borið tað við sær

at vit ikki bara mistu veiðuokið undir Íslandi, men vit vildu eisini mist útroðra- og onnur veiði- og arbeiðsrættindi, vit í dag eiga í GRØNLANDI

Tingið sett at viðgera sjómarksmálið

Frágreiðing frá landsstýrinum

Hósdagin segði ríkisumboðið frá, at úrslitið av samráðingunum, sum danska ríkisstýrið hevði havt við bretar um sjómarkið, var sent landsstýrinum.

Landsstýrið hevur í bráðskundi kallað tingið saman til fundar ígjár seinnapartin. Og æltanin er, at veljast skal 7-mannanevnd at samráðast við landsstýrið um møguleikan av eini fyribilsskipan í fiskimarksmálinum.

Ígjár seinnapartin sendi landsstýrið út hesa frágreiðing:

»17. í hesum seinnapartin fekk landsstýrið frá ríkisstýrinum frágreiðing um tær samráðingar, sum um fiskimarksmálið við Føroyar eru førdar í London 12. s. m.

Av hesi frágreiðing framgongur, at tann danska samráðingarnevndin gjørdi bretum greitt, at ríkisstýrið tók undir í løgtingssamtyktini um at víðka fiskimarkið og samstundis gera Føroyar leysar av sáttmálanum frá 1901 broyttur í 1955 eftir tí fyrivarni, sum tikið er í málinum.

Bretar vístu á, at teir ikki góðkenna tað íslendska 12 fjórðinga fiskimarkið, og kunnu teir tí ikki í løtuni góðtaka, at grundarlag er fyri, at vit gerast leysir av sáttmálanum.

Bretar settu tó fram uppskot um eina fyribilsskipan. Hetta hevur landsstýrið viðgjørt á fleiri fundum, men av tí at ymiskt í tí liggur heldur ógreitt fyri, hevur landsstýrið biðið um nærri frágreiðing hesum viðvíkjandi.

Henda viðmerking hevur fört við sær, at ríkisstýrið heldur tað vera beinast og hentast, at tingingar millum ríkisstýrið og landsstýrið fara fram í Tórshavn, og er tí avgjørt við Tjaldrinum hesa ferð at senda serliga tingingarnevnd við Kampmann finansministara sum formanni. Aftrat honum koma Elkjær Larsen, departementsstjóri, Oldenburg, skrivstovustjóri í uttanríksministeriinum og dr. Bertelsen, biologur.

Sum málið annars liggur fyri, held ur landsstýrið, at tingið velur 7-mannanevnd at samráðast við landsstýrið, og verður uppskot samsvarandi hesum lagt fyri løgtingið í dag, tað kemur saman.«

Oyggjarfundur í Suðuroy

Javnaðarmenn í Suðuroy halda oyggjafund í kvøld á Tvøroyri til við gerðar av uppstillingini til løgtingsvalið 8. november.

— Umboðsmenn koma frá øllum bygdum í oynni.

Tann ið missir mest, tað eru vit føroysku sjómenninir

Eg fari at biðja blaðið hýsa mær hesum, um eg so má siga, hugskotum íslendingum og okkum viðvíkjandi.

Lat meg við tað sama siga, at eingin er meiri yvirbevístur enn eg um, at tað er lívið um at gera hjá bæði íslendingum, føroyingum og grønlendingum, at allur rovfiskiskapur verður forðaður.

Og hvør kann sýta fyri tí, at okkara grunnar eins og stórur partur av íslendsku grunnunum eru rændir av trolinum. Tað er tí sjálvandi í hvørjum blóð dropa í mær samkensla fyri íslendingum í teirra bardaga fyri at fáa hin stóra bretska trolaraflotan út um 12 mílamarkið.

Men tá ið okkara felagsformaður uttan viðmerking fyri okkara viðkomandi sendir samkenslunnar og stríðseggjannar fjarrit til brøður og vinir okkara, haldi eg, at hann í ræðuligasta muni gloymir okkara føroyska fiskimanna kor.

Eg haldi, at hann í telegrammi sínum skuldi skoytt nakað soleiðis upp í:

»Vit og tit, íslendingar, eru í sama báti, hava verið tað ígjøgnum øldur.

Vit føroyingar hava róð út uppi hjá tykkum ígjøgnum mannaminni. Vit hava við snøri og línu leitað okkum okkara dagliga breyð við strendur tykkara íslendinga alla tíðina, vit vóru í ríkisfelagsskapi eins og tíðina eftir slit tykkara við danska ríkið. Vit og tit vita, at við húkinum hava vit ongan skaða gjørt fiskiskapi tykkara. Vit vóna, ja, hava tað treysti til tykkara, okkara frændir, vinir og stalbrøður, at tit ásanna, at okkara og tykkara lagnufelagsskapur, at frænda- og ættarbrøðrakensla tykkara yvir okkum føroyingum vil siga tykkum, at vit føroysku fiskimenninir eiga ein søguligan lívsrætt at fáa loyvi at halda fram við okkara meinaleysa fiskiskapi við snørinum og línuni.

25.000 tons ella 5/6 tons uppá hvørt mannskykt í Føroyum er okkara veiða við Ísland. Um 38.000 tons er okkara veiða við Grønland, men bara um 14000 tons heima á okkara egnu grunnum.

Tit skilja, at tað stigið ella høggið at reka okkum føroyingar heilt av grunnum tykkara uttan mun til hvønn reiðskap, vit nýta, er tað harðasta slagið, vit føroysku fiskimenn á nøkrum sinni hava fingið.

Hetta kunnu okkara bestu vinir, frænd ir og stalbrøður ikki gera!

Vit vænta vinarlag, stalbrøðralag og frændakenslu!«

Eitt er nú tað, hvat ið fiskimannafelagsformaðurin ger ella ikki ger. Men kann hann ikki, so má landið ikki gloyma at lata okkara vinir, frændir og stalbrøður vestan hav vita, hvussu støða okkara er. Og okkara politisku álitismenn megu beinavegin fara til samráðingar við teir. Tað er ikki minni lívið um at gera enn nakað annað, vit baksast við. —

Fiskimaður.

Útvarpið

Leygardagin 20. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl.1830—1840: Veður og tíðindi.
kl.1840—1900: Eitt sindur um útvarpsskránna.
kl. 1900—1945: Leygarkvøldsyrking. Bókaummæli. Tónleikur.
kl. 1945—2000: Johan Kallsoy um Eiðis kirkju.
kl. 2000—2035: Musiksending III. Händel.
kl. 2035—2100: Upplestur.

Sunnudagin 21. september:
kl. 1500—1645: Kvøðuljómar.
kl. 1650—1700: Veður og tíðindi.
kl. 1700—1800: Gudstænasta av Eiði. Brimnes prædikar.

Mánadagin 22. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Lættlig grammofonløg.

Týsdagin 23. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1950: Veður og tíðindi. Barnasending.

Mikudagin 24. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Páll J. Nolsøe: Inngangur til Suðuroyar siglingarsøgu.

Hósdagin 25. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi og tónleikur.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. E. A. Bjørk: Hagalevs jørð II. — E. A. Bjørk og Evðun Winther.

Friggjadagin 26. september:
kl. 1220—1250: Veður og tíðindi. Uttanríkispolitisk evni.
kl. 1830—1915: Veður og tíðindi. Bjarni Mohr: Andreas Reinert í Norðadali.

Bókakassarnir

Landsbókasavnið boðar frá, at bókakassarnir verða sendir út á bygdirnar frá umleið 1. oktobur í ár. Tey, ið vilja hava bókakassa til láns í vetur, eiga tí longu nú at siga frá til Landsbókasavnið í Havn. Bókakassarnir eru so fáir, at vanliga verður bert ein kassi við o. u. 40 bókum latin til hvørja bygdina. Hann, ið hevur bókakassan undir hondum, skal hava fylt 21 ár. Við uppsløgum ella á annan hátt eigur hann at siga frá, at hann hevur bókakassa, so øll í bygdini kunnu fáa høvi til at læna bøkurnar. — Nærri reglur um, hvussu útlánið skal fara fram, fylgja við hvørjum einstøkum kassa.

Eisini verða teir lærarar, ið vilja hava barnabókakassa til skúlan, bidnir um at siga landsbókasavninum frá nú.

Hvar havna Hákun og Erlendur

Serstakliga tveir menn hava verið dúgliga til umræðu nú uppundir uppstillingina — Hákun Djurhuus og Erl. Paturssson.

Politiska støða Hákunnar er ógviliga hættislig. Hann hevur ongar møguleikar at verða valdur í nøkrum valdømi uttan í Norðoyum; men eisini har er tað ógviliga ivasamt, um hann nærindis kann fáa nóg mikið av atkvøðum at verða valdømisvaldur

Erlendur Paturssson varð seinast valdur í Sandoynni. Tjóðveldismenn bera stóran ótta fyri, at hann ikki verður afturvaldur har suðuri; tí hevur verið dúgliga talað um at flyta hann til annað valdømi, har støðan ikki er so hættislig.

Tað er tí ein spurningur, um Tjóðveldismenn ofra Jóhan Simonsen í Norðoyum til frama fyri Erlend.